


*Venjarin hjá ÍF, Suni Hansen, sum her leggur sínum spælarum lag á, var væl nøgdur við innsatsin hjá ungu monnunum, sum vunnu á Fleyr fríggjakvøldið og tí er oddalið í Eik-liguni hjá monnum*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

# Teir ungu tordu

**FLOGBÓLTUR** Uttan teir mest rutineraðu spælararnar, Bartal Eliasen og Rúna Weihe, megnaði ÍF fríggjakvøldið at vinna á Fleyr, sum tí dragnaði eitt sindur í manskappingini

**Hilmar Jan Hansen**

Talan var um ein rímiliga javnan og ikki sørt undirhaldandi dyst, sum mansliðini hjá ÍF og Fleyr spældu á Kambsdali fríggjakvøldið. Serliga vóru tað fleiri langar duellir, ið gjørdu tað stuttligt hjá áskoðarunum.

ÍF var kortini liðið, ið hevði munin, tá samanum kom. Hvørki Bartal Eliasen ella Rúni Weihe, sum eru teir mest rutineraðu spælararnir hjá fuglfirðingum, vóru við, so tí lá so mikið størri ábyrgd á herðunum á teimum ungu.

– Liðið, vit høvdu hesa ferð, var stórt sæð tað sama, sum spældi alla kappingina í fjør, so tað var stuttligt at síggja, at teir ungu tordu at spæla. Sum heild koyrdi tað væl hjá okkum, sigur venjarin hjá ÍF, Suni Hansen.

Eitt undantak frá liðnum í fjør var kortini, tí fyrrverandi landsliðsvenjarin, Magnus Aðalsteinsson, sum í vetur er venjari hjá ÍF-kvinnunum, spældi við monnunum fríggjakvøldið.




## Aftur og fram

At byrja við sá út til, at ÍF ætlaði at gera bart, tí í fyrsta setti var ÍF á odda allan vegin. Sama gongdin helt fram í øðrum setti, men so steðgaði upp og Fleyr raknaði meira við. Og hóast ungu fuglfirðingarnir komu fyri seg aftur ímóti endanum, tók Fleyr hetta settið.

Fleyr tóktist hava fingið fatur í rætta endanum, tí í fjórða setti vóru havnarmenninir á odda 19-15, áðrenn tað vendi, tá ÍF svaraði aftur og vann.

Fjórða sett, ið sálarliga var avgerandi fyri báðar partar, var nokk so javnt. Men ímóti endanum sá ÍF út til at fara til stroks, men tá fuglfirðingarnir komu upp á 22, kom stígur í hjá teimum, so Fleyr fekk javnað til 22-22. Men í evstu løtu vann ÍF avgerandi bóltarnar og tók eisini hetta settið.

Við sigrinum hevur ÍF lagt seg á odda í Eik-liguni hjá monnum, nú liðið hevur fingið átta stig burtur úr sínum fimm dystum, so líkt er til, at hetta verður annað kappingarár, enn tað var í fjør. Fleyr liggur hinvegin næstaftast við fýra stigum fyri sínar fimm dystir, so ósigurin merkir í øllum førum, at Fleyr hevur nógv at arbeiða við og fáa upp á pláss til komandi dystir.

hilmarjan@sosialurin.fo

**Mjølnir - TB** 3-1
25-11, 25-21, 19-25, 25-11

**ÍF - Fleyr** 3-1
25-22, 19-25, 25-22, 25-22




*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fingu fyrsta settið

**FLOGBÓLTUR** Dysturin í Klaksvík í gjár millum mennirnar hjá Mjølnir og TB endaði, sum væntast kundi, tí Mjølnir vann. Men stuttligt var hjá teimum ungu TB-arunum at taka sítt fyrsta sett í vetur

**Hilmar Jan Hansen**

Tá tú skalt seta tær mál fyri, hvat tú ætlar tær at røkka, er ofta skilagott at vera realistiskur. Nú flogbóltsmenninir hjá TB eru komnir upp í bestu deildina, hava teir tráa eftir at vunnið sítt fyrsta sett, og hetta gjørdist veruleiki, tá TB í gjár var í Klaksvík og spældi ímóti Mjølnir.

Liðið hjá klaksvíkingum er vanliga við í fremstu røð, og lítið bendir á, at ætlanin er nakað annað í ár heldur. Tí var ikki væntandi, at TB skuldi fáa tað stóra við sær suðuraftur, men »against all odds« eydnaðist TB-monnunum at síggja annað enn eitt null á sínari síðu á úrslitatalvuni.

Eftir fyrsta settinum at døma, bendi sera lítið á, at TB skuldi fáa nakað sum helst, tí Mjølnir var greitt omaná og vann sannførandi. Men í øðrum setti minkaði munurin í stórum, og í triðja setti hendi so tað, ið menninir høvdu ynskt sær. Tað gekk sum eftir ánni, og TB var á odda 24-11, tá stígur kom í. Boban Ilic, sum hevði sitið uttanfyri eina løtu, kom á vøllin fyri Mjølnir, og tað var um reppið, at TB ikki megnaði at vinna síðsta bóltin, sum gav settið.

Men tað eydnaðist – og spælararnir vóru so fegnir, at teir fullkomuliga gloymdu at koyra armarnar niðuraftur. Prísurin fyri tað gjørdist, at Mjølnir var líka sannførandi í fjórða setti, sum í fyrsta, og tí gjørdist tað bara við hetta eina settið hjá TB hesa ferð.

Hóast Mjølnir hevur ein smalan hóp, eru einstakir spælarar, ið veruliga kunnu muna, tá tað stendur eitt sindur á. Sum nevnt, gjørdi Boban góðan mun, tí tá hann var inni og góða lagið var á honum, hevði blokkurin hjá TB ongan kjans at taka bóltarnar. Nakað tað sama var eisini í fleiri førum, tá Jón Syderbø spenti seg út í álopsspælinum.

– Sjálvt um tað enn eina ferð bleiv eitt tap, eru vit væl nøgdir við dagin. Tað er gott hjá monnunum at síggja, at tað ber til at vinna eitt sett ímóti einum av frægaru liðunum, og tað gevur mót og áræði at halda fram, sigur ein av venjarunum hjá TB, Otto Gram.

## Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 5 | 4 | 1 | 12 | 5 | 7 | 8 |
| 2 | SÍ | 4 | 3 | 1 | 11 | 3 | 8 | 6 |
| 3 | Mjølnir | 5 | 3 | 2 | 9 | 7 | 2 | 6 |
| 4 | Fleyr | 5 | 2 | 3 | 8 | 11 | -3 | 4 |
| 5 | TB | 5 | 0 | 5 | 1 | 15 | -14 | 0 |